Brotsspørk kostaðu

Eftir at okkara menn høvdu verið á odda 2-0 móti íslendingum, mátti landsliðið enn einaferð taka til takkar við einum teprum ósigri móti grannunum fyri norðan. Tvey av íslendsku málunum komu eftir brotsspark

JÁKUP MØRK

Klokkan 13.00 okkara tíð, fór Føroyska landsliðið enn eina ferð á vøllin niðri á La Manga, har seinni dysturin á venjingarleguni stóð á skránni.

Mótstøðuliðið hesu ferð vóru grannar okkara fyri norðan, Ísland, sum føroyar hava hitt rættuliga ofta í landsliðshópi, men sum tað ongantíð hevur eydnast okkum at vunnið á. Mangan hevur tað verið nær við og næstan, men kortini ikki nóg mikið.

Broytt lið

Í mun til dystin mánadagin móti Finnlandi, var føroyska liðið nakað broytt, tá farið varð á vøllin fríggjadagin.

Tveir av sjálvskrivaðu leikarunum, Todi Jónsson og Óli Johannesen vóru nú aftur klárir at spæla, men hinvegin vóru Jákup á Borg og Uni Arge nú noyddir at sita uttanfyri, tí báðir høvdu onkrar snuddir at stríðast við.

Landsliðsvenjarin, Allan Simonsen hevði sett liðið soleiðis saman: Jens Martin Knudsen - Øssur Hansen, Jens Kristian Hansen (liðf.), Jan Dam, Óli Johannesen, Henning Jarnskor - Fróði Benjaminsen, Allan Mørkøre, Julian Johnsson - Kurt Mørkøre, Todi Jónsson.

Góður fyrri hálvleikur

Eftir úrslitinum at døma, gekst bara heilt væl hjá okkara monnum fyrstu trý korterini. Eftir eina heldur varliga byrjan, fingu føroyingar onkran smærri málmøguleika, og tá 19 minuttir vóru farnir, kundu leikarar okkara fegnast, tá bólturin lá í mótstøðumálinum.

Hetta hendi eftir at Todi Jónsson var farin ígjøgnum íslendsku verjuna, og tá hann ikki fekk bóltin í netið sjálvur, var álopsfelagin, Kurt Mørkøre, á blettinum og smekkaði bóltin í netið.

18 minuttir seinni kundu føroyingar enn einaferð fegnast. Ein bóltur varð stungin inn um íslendsku verjuna, og tá eingin av mótstøðumonnunum megnaði at fylgja við Toda, kundi hann við vinstra beininum senda bóltin í netið.

Sum vera man, var hýrurin á føroyingum góður, men stutta løtu seinni var munurin minkaður niður í eitt, eftir at Jan Dam hevði forbrotið seg í brotsteiginum, soleiðis at Rikardur Dádason kundi senda bóltin í netið frá 11 metrum.

Aftur brotsspark

Í hálvleikinum varð Johannus Joensen sendir á vøllin ístaðin fyri Jan Dam, sum ikki kendi seg heilt væl.

Um hetta órógvaði føroyska verjupartin skal vera ósagt, men tá 12 vóru leiktir av seinna hálvleiki, fekk Ísland aftur brotsspark, tá Jens Kristian feldi íslendskan leikara, tá hesin var á veg inn í brotsteigin.

Rikardur Dádason varð aftur setttur at skjóta, og heldur ikki hesu ferðina sveik hann álitið, og nú stóð á jøvnum 2-2.

Løtu seinni var aftur vandi á ferð framman fyri íslendska málinum, men Birgir Kristinsson bjargaði einari góðari frísparksroynd frá Óla Johannesen.

Tá 20 minuttir vórðu leiktir, varð Sámal Joensen settur á vøllin fyri Allan Mørkøre.

Stutta løtu eftir hetta, var aftur galið í føroyska brotsteiginum. Íslendska álopið var um at verða liðugt, men kortini fingu teir beint bóltin inn fyri aftur, og har kundi Bjarki Gunnlaugsson setta kollin undir bóltin, og nú stóð 3-2 til Ísland.

Móti endanum av dystinum fingu eisini Heðin á Lakjuni og Rógvi Jacobsen møguleikan, ístaðin fyri Fróða Benjaminsen og Kurt Mørkøre, men teir megnaðu kortini ikki at broyta nakað um støðuna, og taptu føroyingar sostatt báðar venjingardystirnar á hesum sinni.

Lesið meira um landsliðið og venjingarleguna á La Manga í ÍtróttarSosialinum týsdagin

Todi Jónsson var aftur at síggja í føroyska álopinum, og hann átti lut í báðum málunum, sum okkara menn fingu

Svartklæddir menn

Dómarapørini til steypafinalurnar koma úr ávíkavist Neistanum og Tjaldur

JÁKUP MØRK

Tað verða tvey ymisk dómarapør, sum fara at leiða teir báðar finaludystirnar uppi á Hálsi í dag.

Hjá kvinnunum verða tað altjóða dómarar okkara, Hjalmar Petersen og Kristian Johansen, sum skulu stýra dystinum.

Einki er at ivast í, at dysturin tá er í góðum hondum, tí bæði her heima og uttan fyri landoddar okkara, hava teir báðir í fleiri ár stýrt dystum, har nógv hevur staðið á hjá báðum pørtum.

Nýggj andlit

Hjá monnunum verða tað teir báðir runavíkingarnir, Kári og Dánjal Hansen, sum skulu hava ábyrgdina av leiðsluni.

Teir báðir hava nú í nøkur ár dømt saman, og tá inniverandi kappingarár byrjaði, var gjørt av, at hetta skuldi verða eitt av teimum pørum, sum skuldu fáa nógvar dystir.

Tað var nevnliga soleiðis, at føroysku hondbóltsdómararnir áðrenn hetta kappingarárið settu sær fyri, at nú skuldu tað bert verða nøkur fá dómarapør, sum harafturímóti skuldu døma so nógvar dystir sum gjørligt.

At byrja við vóru tað helst fleiri, undirritaði íroknaður, sum funnust at, a teir í fleiri førum ikki tóktust nóg avgjørdir, men sum árið er farið, og royndirnar eru vorðnar fleiri, hava teir tikið seg nógv fram hesum viðvíkjandi.

Ikki tí, feildómar og annað vilja altíð koma fyri, men tað er sera umráðandi, at dómaraparið kortini megnar at leiða dystin, og hetta hevur hepnast sera væl hjá runavíkingunum seinastu dystirnar. Serliga legði ein til merkis, hvussu stóran myndugleika teir báðir sýndu, tá teir fyri stuttum dømdu landskappingardystin millum Kyndil og VÍF. Eina uppgávu sum teir loystu til fulnar.

At nýggj andlit gera vart við á somikið positivan hátt er sera hugaligt at síggja. Hetta vitnar helst eisini um tann framburð, sum føroyskum hondbólti hevur verið fyri seinnu árini, og sum vónandi gerst enn størri, nú altjóða luttøka stendur fyri durum.

Kanska hava føroyingar eitt nýtt altjóða dómarapar í júst teimum báðum. Tað er kanska í so tíðliga at siga nakað um enn, men um framgongdin stendur við, er hetta als ikki óhugsandi.

FM-heitini fara nú at nærkast

Hóast tað enn eru nakrir dystir eftir at leika, er mest sum allur spenningurin longu farin úr kappingin hjá monnum og kvinnum. Í hvussu so er tá umræður FM-heitið

JÁKUP MØRK

Hetta vikuskiftið verða fimm dystir leiktir í fremstu flogbóltsdeildunum her á landi, og hóast tað so at siga longu er avgjørt, hvar gullkrónurnar enda, so er framvegis nógv eftir at spæla um hjá hinum liðunum í deildini.

Hjá kvinnunum varð fyrsti dysturin leiktur longu fríggjadagin, tá ÍF og TB hittust í høllini á Kambsdali. Hvussu úrslitið av hesum dysti gjørdist, vita vit ikki í skrivandi løtu, men hevur TB fingið væntaðu stigini, hava tær styrkt sær munandi um støðuna á stigatalvuni, har tær frammanundan vóru á øðrum plássi, ájavnir við Drátti á triðja plássinum.

Seinni dysturin hetta vikuskifti stendur millum Mjølnir og Fleyr, sum leygardagin hittast í KÍ-høllini. Einki er at taka seg aftur í, at Mjølnir eru stórfavorittar undan dystinum, tí higartil í ár hava tær skúgva alla mótstøðu til viks, meðan tað hjá Fleyr hevur gingið út av lagi vánaligt.

Fleyr fer longur fram

Triggir dystir skulu leikast í bestu mansdeildini um vikuskiftið, og verða tveir teirra leiktir leygardagin.

Í Eysturskúlanum skal Fram royna seg móti ÍF, og mett eftir úrslitunum higartil í ár er lítið at ivast í, at Fram er favorittur at vinna dystin. ÍF hevur tó fyrr avrikað okkurt óvæntað í ár, so havnarmenninir skulu helst ikki kenna seg alt ov tryggar.

Í Klaksvík verður eisini dystur í mansdeildini leygardagin, tá menninir hjá Fleyr koma á vitjan. Mjølnir liggja í løtuni á øðrum plássi í kappingini, men ilt er at ímynda sær, at teir framvegis eru á hesum plássi eftir dystirnar leygardagin. Higartil hava menninir hjá Fleyr verið fullkomuliga suverenir, og lítið er at ivast í, at Mjølnir má lata sær lynda, at teir eftir vikuskfitð eru farnir aftur á triðja plássið.

Sunnudagin skulu menninir hjá Fleyr aftur royna seg, og verða tað tá sørvingar, sum standa hinumegin netið. SÍ hevði eitt tíðarskeið rættuliga góðan byrð, men síðani vetrarstøðgin hava úrslitini ikki verið heilt so góð. Ikki er sannlíkt, at hetta broytist stórvegis sunnudagin, tá Fleyr helst fyllir sær tvey stig afturat í stigaposan, sum nú er um at verða fullrokaður.

Higartil hava menninir hjá Fleyr verið púrasta suverenir, og væntandi koma fýra stig afturat um vikuskiftið

Gullbrúdleypsparið Aðalbjørg og Sigurd Joensen í Oyndarfirði

Í dag kunnu hjúnini Aðalbjørg og Sigurd Joensen úr Oyndarfirði halda fimtiára dagin fyri at tey játtaðu seg hvørjum øðrum í heilaga hjúnarlagið. Dagurin er stórur, tí slett ikki øll hjún náa so høgan aldur og onnur klára slettis ikki at halda hvønn annan út í so mong ár og forføllini kunnu verða mong á eini fimtiára lívsbreyt. Dagurin, tá hjún halda fimti ára brúdleysdag er altíð stórur í eini lítlari bygd. Hetta er triðja brúdleypsveislan hjá teimum fle,stu og í einum lítlum bygdarsamfelag hevur tú á ein ella annað hátt tætt samband við tey flestu. Tá tvey giftast úr somu bygd, sum Sigurd og Aðalbjørg, so er tú ella hjúnafelagin í familju við so at siga hvørt mannsbarn í bygdini. Og tá gerast hátíðardagarnir altíð stórir og viðkomandi fyri øll.

Sigurd er ein kendur maður. Hann hevur siglt alt lívið og hann var tiltikin raskur og sterkur maður sum yngri. Sigurd er ein av Guttabeiggjunum í Oyndarfirði og teir hava allir sjey sum ein verið dugnaligir og álítandi sjómenn. Í dag verður ikki tosað so nógv um styrki sum ein neyðugur eginleiki, skal tú klára teg í lívinum, men tá Sigurd var ungur og sjólívið var hart og baldrut, tá stóð tú teg betri, vóru evnini í lagi ella í meira lagi.

Siglingarsøgan hjá Sigurdi er drúgv og litrík og ov rúmlig at festa á blað her. Míni fyrstu barnaár var hann við línubátum úr Klaksvík. Hann sigldi við skyldmonnum sínum, Laksafossbrøðrunum. Eg haldi, at hann undan hetta eisini var við Álaker, sum bróðurin John á Sýnuni so fyrimyndarliga førdi. Har vóru teir flestu beiggjarnir við.

Tá nótabátarnir komu miðskeiðis í sekstiárunum vóru boð eftir Sigurdi. Hann fór at sigla við Saturn úr Gøtu og har var hann við í mong Harrans ár. Skipari var Per Gregersen, sáli úr Gøtu og teir vóru vinmenn. Síðan sigldi hann við nótabátinum "Gøtunes".

Sigurd gavst ikki á hondum, tá hann legðist uppi fyrst í áttatiárunum. Tá varð havnin í Oyndarfirði liðug og beinanvegin fór hann undir at fyrireika fiskaarbeiði í Oyndarfirði. Hann og Hans Pauli Johannesen, saltkongurin, sáli, høvdu nógv virksemi í Oyndarfirði eitt skifti.

Sigurd er fittur í hondunum og sum smádrongur øvundaði eg mangan allar reiðskapin hann átti. Nógvar eru messinga-flaggstengurnar, sum Sigurd hevur evnað til á frívaktum umborð á skipi og seinni heima. Hesar prýða mangar stovur í dag. Tillukku við degnum Sigurd.

——

Aðalbjørg er fastur mín, tað vil siga hon kemur av Marknagili í Oyndarfirði og er dóttir Justinus og Magninu Eidesgaard. Hon verður als ikki kalla Aðalbjørg heima hjá okkum millum systkin. Hon verður bara nevnd gumma, hóast hon bert er gumma at elstu systrinni í okkara systkinnaflokki, ið telir seks.

Og gumma er ikki hvør sum helst heima hjá okkum. Hon er ein so stórur partur av familjuni, at neyvan fer dagur afturum, uttan at hon verður nevnd og tað fleiri ferðir eisini. Pápi var yngstur av systkinnum á Marknagili og hann er vorðin so gott og grundiga forkelaður av systrunum báðum og tit kunnu ætla at tær hava stórt pláss í hansara lívi. Eg minnist ikki eina tí einastu hending míni barnaár av týdningi, har hon ikki hevur luttikið á ein positivan og sum oftast stuttligan hátt.

Gumma er eitt so einastandandi interessant menniskja og hevur hjartað á tí røttu síðuni. Hon minnist væl og hevur áhuga fyri slekt. Sjálvur havi eg notið gott av hennara minni, nú eg sjálvur flytist spakuliga longur út á greinina og min ætt fær størri týdning. Hon greiðir frá við einum smíli og hon er ikki sørt errin av ættini. Ja, Ja, tað vil sjálvsagt altíð vera onkur, sum vit tosa meira um enn onnur í familjuni, men tað vil so vera og kanska røddin verður eitt sindur meira hulin, tá okkurt, sum var ikki heilt sum tað átti at verða, verður tikin upp á mál. Og tit kunnu ætla, at nógv hevur verið prátað síðan Eidesgaard ættin helt ættarveislu á Kambsdali fyri góðum tveimum árum síðani, í fagrasta summarveðri.

Og so er hon so luttakandi í samrøðunum. Eg kenni einki menniskja, sum vísir sínar kenslur so berar og ófjaldar sum gumma. Hon smílist tá evnið er lætt og tár fella, tá evnið er tyngri og so skjótt hon kann skifta ímillum. Ja, tú hvøkkur næstan við. Alt lívið rúmast í henni næstan í einum. Tær syrgiligu hendngarnar, tað lagnutunga og síðan tað lætta og deiliga, blandað saman soleiðis helvt um helvt, júst sum lívið lagar seg hjá teim flestu. Ella sum danska sálmaskaldið Kingo tekur til í 1681:

"Sorrig og glæde, de vandrer til hobe,
lykke, ulykke de ganger på rad
medgang og modgang hinanden tilråbe
solskin og skyer, de følges og ad.
jorderigs guld
er prægtig muld,
Himlen alene af salighed fuld."

Og so er gumma full av skemti, hon dugir at sita undir, hon dugir at siga frá, soleiðis at tú gloymir tíð og stað og rættuliga livir teg inn í hendingarnar so hvørt sum tær búnast, og taka skap, áðrenn tær sleppa varrum hennara.

Gumma er trúføst og "uppmærksom" sum vit siga á vanligum talumáli. Neyvan fer ein føðingardagur framvið í familjuni, sum hon ikki minnist og sleppir hon ikki sjálv, so ringir hon ella skrivar. Hon hevur so stak vakra hondskrift og fleiri eru brøvini, hon sendi mær, tá eg læs niðri. Øll eru goymd, sum flógv minni um eina farna tíð.

Sjálvur sleppi eg ikki í brúdleyp í kvøld, tí hesi orðini. Heilt erligt, stuttligt hevði verið at sitið millum míni, millum kend fólk í kvøld og reypað mettur og skorrreyður av góðum døgurðamati og onkrum rómakendum omaná. Kenni eg gummu rætt, so hevur hon havt ein fingur við í spælinum, tá kokkarnir hava sett matseðilin saman.

Hjartaliga tillukku við degnum og góða eydnu tit bæði á leiðini fram.
heilsan

Justinus Eidesgaard úr Hamborg

Tað sum hjartað er fylt av

Maður hevur gjørt seg sjálvan til nakað, sum líkist einum føstum blaðmedarbeiðara í at spilla út alt, sum kristið er. Eg havi lisið eina fitta søgu, sum sambært evangelium hansara í veruleikanum er ein djevulsins illgerð úr enda í annan. Tað sum kristin fólk yvirhøvur uppfata sum gott, vil hann við Bíbliuni í hond lýsa at vera synd og óndskapur. Sjálvur havi eg eisini eitt dømi, sum kundi verið lýst á sama hátt. Tað er um Mariu og Josef. Tá Josef fann útav, at Maria var uppá vegin, sjálvt um hann ikki hevði verið henni nær, tá vildi hann skilja seg frá henni í loyndum, fyri at skomm ikki skuldi koma yvir hana.

Men lógin segði, at hon skuldi lata lív, so hvussu kundi hann gera nakað so »syndadálkað«, sum at verja hana? Vit sum trúgva Bíbliuni, kenna svarið so væl: »Tí hann var rættvísur maður«. Tey sum ikki vilja trúgva sannleikanum, tey skulu trúgva lygnini. Og lygnin skapar hatur, hatur til sannleikan. Tí skilja tey ikki lógina, og als ikki boðskapin.

Norðmenn hava eitt fast útsagn um fólk, sum hava sálarligar ella hugsjónarligar blokeringar, vit siga: »Han har hakk i plata«, og vísir hetta til tað fyribrigdi, at ein grammofonpláta koyrir í sama spor umaftur og umaftur, og sleppur ikki víðari. Grammofonin er søga í dag, men fólk sum hava »hakk i plata« fara vit altíð at hava okkara millum.

Medarbeiðarin er at sammeta við ein mann, sum brýtur tvørt við foreldur síni, sum hann hevur okkurt ímóti.Hetta ger hann ikki fyri at fáa frið fyri teimum. Hann leggur upp til at forfylgja teimum við ábreiðslum og ákærum um lík og ólík.

Hann kann eisini sammetast við ein mann, sum hevur skilt seg frá konu síni, men vil ikki lata hana hava frið. Hon sleppur ikki at liva sítt egna lív, tí hann vil altíð blanda seg, oa ltíð spilla hana út so nógv hann er førur fyr.

Eg havi sað, at fólk í vælvild hava roynt at svara medarbeiðaranum aftur, sum hampafólk ynskja at gera. Hvørjum halda tit a tit svara? Spyrjið fakfólk, sum hava ta neyðugu útbúgvingina og royndirnar. (Tað hevði dómsvaldið gjørt). Og svarið hevði verið, at hasin eldurin fer at brenna til dómadag. Men hví skulu tey trúgvandi bera brenni til bálið?

Helst kemur einki gott burturúr tí. Medarbeiðarin kennir Bíbliuna eins væl og djevulin ger, og hann lesir hana í sama anda.

Thorbjørn Brochs

Lesið eisini Sosialin á Internetinum

www.sosialurin.fo

REPROZ
GRAFISKAR LOYSNIR
Tel +298 31 95 40
Fax +298 31 75 41
Alt innan prentlutir
Mail: jakzac@post.olivant.fo